# Dømi um hvør rindar hvat, tá tú nýtir fartelefonina uttanlands.

**Um tú ringir frá tínari fartelefon í øðrum landi til eina telefon í Føroyum:**
Tú rindar kostnaðin av uppkallinum til Føroya frá landinum tú ert í – eisini uppringingargjald.
Móttakarin rindar einki.

**Um tú ringir frá tínari fartelefon í øðrum landi til eina útlendska fartelefon, ið eisini er í øðrum landi:**
Tú rindar kostnaðin av uppkalli til tann bólk, har landið tú ringir til, er í.
Móttakarin rindar einki.

**Um tú ringir frá tínari fartelefon í øðrum landi til eina føroyska fartelefon, ið eisini er í øðrum landi:**
Tú rindar kostnaðin av uppkalli til Føroya.
Móttakarin rindar bólkakostnaðin í landinum hann er í, fyri at taka ímóti uppkalli úr Føroyum.

**Um tú tekur ímóti einum uppkalli til tína fartelefon uttanlands frá einari telefon í Føroyum:**
Tann ið ringir í Føroyum rindar føroyskan samrøðukostnað fyri at ringja til eina føroyska fartelefon í Føroyum.
Tú rindar bólkakostnaðin í landinum tú ert í, fyri at taka ímóti uppkalli úr Føroyum.

**Um tú ringir frá tínari fartelefon í øðrum landi til eitt heimanummar uttanlands:**
Tú rindar kostnaðin frá landinum tú ert í til tann bólkin, sum móttakaranummarið er í.

**Um tú tekur ímóti uppkalli til tína fartelefon uttanlands frá einum heimanummari uttanlands:**
Heimatelefonin rindar lokalan uttanlandskostnað til Føroya.
Tú rindar kostnaðin fyri móttøku av uppkalli í tí bólki, sum tú ert í.

**Um tú tekur ímóti uppkalli til tína fartelefon uttanlands frá einari føroyskari fartelefon uttanlands**:
Telefonin, sum ringir, rindar kostnaðin frá útlandinum til Føroya.
Tú rindar fyri at taka ímóti uppkalli í tí bólkinum, tú ert í.